## Klettskarð aftur mál

U21-landsliðsspælarin, Páll Klettskarð, sum spælir við Vanløse í triðbestu donsku fótbóltsdeildini, skoraði í venjingardysti leygardagin. Hetta er triðja dystin á rað, at klaksvíkingurin fær mál, og harvið sær út til, at Páll Klettskarð veruliga hevur skotið seg heitan, nú kappingin leygardagin verður tikin uppaftur eftir vetrarsteðg.



## Galla fyri tey ungu

Eins og síðstu tvey árini, skipar H71 aftur í ár fyri gallaveitslu, sum er fyri spælararnar í deildunum gentur 17 og dreingir 17 ár. Karmurin er eisini tann sami, aulan í Hoydølum, har spælararnir úr ymsu feløgunum møta gallaklæddir leygarkvøldið 20. mars. Borðreitt verður við sjálvtøkuborði og endar borðhaldið við, at bestu spælararnir verða heiðraðir, áðrenn dansurin byrjar.



Fleiri føroysk met og juniormet blivu sett leygardagin, tá Ægir-stevnan var í Svimjihøllini í Klaksvík
Mynd: Svimjisambandið

# Fleiri svimjimet í Klaksvík

### Tá Ægir leygardagin skipaði fyri stórari svimjistevnu, blivu fleiri føroysk met og juniormet sett

Eitt av føroysku metunum, sum var sett leygardagin, settu fýra kvinnur úr Ægir, tá tær svumu fýra ferðir 200 metra frísvimjing við tíðini 8:58.93 minuttir. Hetta var ein munandi betring av gamla metinum upp á 9:13.10 sum Tvøroyrar Svimjifelag setti í einari kapping í Havn í fyri fimm árum síðani.

Tær fýra úr Ægir – Cecilia Eysturdal, Eva Trygvadóttir, Turið S. Christiansen og Monika Biskopstø – settu samstundis nýtt juniormet á hesum teininum, tí tær allar eru nóg ungar til at seta juniormet. Einki juniormet var áðrenn, men Svimjisambandið hevði sett eina kravtíð upp á 9:50.21, sum Ægir-svimjararnir væl og virðiliga kláraðu, tí tíð teirra var 51 sekund og 28 hundraðpartar betri enn kravtíðin!

Eitt annað føroyskt met setti Poula Øssursdóttir Mohr úr Fuglafjarðar Svimjifelag, tá hann svam 50 metra firvaldsteinin við tíðini 30.29 sekund. Harvið tók hon metið upp á 30.50 sekund, sum Astrid Foldarskarð úr svimjifelagnum Flot setti í landsdystinum ímóti Íslandi í heyst.

Eitt av elstu metunum, settu stóð fyri skotum leygardagin, settu fýra svimjarar úr Suðuroyar Svimjifelag, tá teir svumu fýra ferðir 200 metra frísvimjing við tíðini 8:11.26 minuttir. Svimjararnir Eyðbjørn Joensen, Jón Hofgaard, Sofus Bech og Pál Joensen tóku sostatt metið upp á 8:11.62 minuttir, sum Bogi Lenvig, Heini Harryson, Kristoffur Hentze og Kristian Martin Joensen úr Havnar Svimjifelag settu í føroyameistarastevnuni afturi í 1999!

### Fleiri onnur met

Í kappingini leygardagin gjørdist Cecilia Eysturdal gjørdist fyrsti svimjari á Ægir-liðnum, sum setti nýtt føroyskt juniormet í 200 metra frísvimjing, sum hon svam við tíðini 2:09.82 minuttir.

Eisini settu Hjørtur á Fløtti, Alvi Hjelm, Sigmund Mørkøre og Bjarni M. Petersen úr Ægir nýtt føroyskt juniormet í fýra ferðir 200 metra frísvimjing hjá monnum, tá teir fingu tíðina 8:46.71. Her var einki juniormet áðrenn, men Svimjisambandið hevði ásett eina kravtíð upp á 8.52.44 minuttir, sum teir fýra eisini fóru eitt fitt petti niðurum.

Finalurnar á 50 metra teinunum vórðu svomnar sum eitt slag av »útskiljingarkapping«, har spakuligasti svimjarin varð tikin burturúr eftir hvønn riðil, og síðani svam restin finaluna umaftur og umaftur við bara tveimum minuttum millum hvønn riðil. Tann svimjarin, sum síðstur var eftir, varð so vinnari.

Her gjørdust vinnararnir hesir: Poula Øssursdóttir Mohr úr Fuglafjarðar Svimjifelag í 50 metra firvaldi hjá kvinnum og Pál Joensen úr Suðuroyar Svimjifelag hjá monnum, Birita Debes úr Svimjifelagnum Flot í 50 metra ryggsvimjing hjá kvinnum og Magnus Jákupsson úr Havnar Svimjifelag hjá monnum, Tanja Skaalum úr Suðuroyar Svimjifelag í 50 metra bringusvimjing hjá kvinnum og Jón Hofgaard úr Suðuroyar Svimjfelag hjá monnum, og at enda Cecilia Eysturdal úr Ægir í 50 metra frísvimjing hjá kvinnum og Pál Joensen úr Suðuroyar Svimjfelag hjá monnum.

## Heilt upp í 65 ár

Umframt vanligu svimjararnar, sum høvdu meldað seg til Ægir-stevnuna í Klaksvík um vikuskiftið, vóru eisini 12 kvinnur og 29 mans frá árgangi 1945 til 1983 við í kappingini, sum sostatt spenti víða í aldri, frá 12 árum upp í 65 ár.

Seinnapartin leygardagin var eisini kapping fyri Masterssvimjarar, sum eru svimjarar eldri enn 25 ár. Har lá serliga væl fyri hjá Havnar Svimjifelag, sum eisini hevði fleiri svimjarar við har, enn nakað av hinum feløgunum.

At knotur enn eru í fleiri av teimum, sum vit fyrr hava hoyrt nógv um, sæst av, at millum vinnararnar vóru svimjarar sum Karina Petersen, Hákun Steingrímsson, Árni Winther, Aksel Haraldsen, Eyðun Húsgarð, Petur Heðin á Fløtti, Eyðun Bærentsen, Bogi Hansen, Høgni Mikkelsen og Jon Hestoy.

hil